# Blikk við hekklaðum summardáa



## Tilfar :

- Blikk
- Sandpappír
- “ Hobbylack gloss” máling
- Pensil
- Bummullargarn ( Eg havi brúkt Mandarin Naturell frá Sandnes Garn )
- Hekklinál nr 2½
- Límpistól og lím

1. Vaska blikkið væl bæði innan og uttan (eg brúkti Terpentin at fáa límið av blikkinum).
2. Pussa blikkið eitt sindur við sandpappíri
3. Mála blikkið við “Hobbylack gloss “ máling. Fyrst ein umgang við hvítari máling og síðani tveir við svartari máling
4. Hekkla ein summardáa og líma hann á blikkið

**Hekkla summardáa**

1. Hekkla 5 lm við gulum tógvi



2. Tak saman til ein ring við 1.lm. Hekkla 3 lm



3. Hekkla 11 stm. í ringin, og síðan 1lm í ta 3.lm, sum tú byrjaði umf við. Slít tráðin.



4. Hekklað 12 lm við hvítum ímillum tvær stm



5. Hekkla 1 lm afturat, har tú byrjaði at hekkla tær hvítu lm = fyrsta krúnublaðið



6. Hekkla 1 lm ímillum tvær tær næstu stm. Halt á fram á henda hátt til tú hevur hekklað 12 krúnubløð. Strúk blómuna slætta og líma hana á blikkið.

